**Gøtu Ítróttarfelag**
**Stovnað: 29.10.1926**
**FO-510 Gøtu, Postrúm 4**
**Tlf. 412024/Fax 442024**
**Formaður:** Jógvan Gregersen

**Meistarar (6):** 1983, 1987, 1993, 1994, 1995, 1996
**Steypavinnarar (5):** 1983, 1985, 1996, 1997, 2000
**Greipuvinnarar (2):** 1983, 1996
**Í 1. Deild (23 ár):** 1980-
**Í Europa (10):** Meistarakapping 1997/98, Steypavinnarar 1998/99, UEFA Cup 1993/94, 1994/95, 1995/96, 1996/97, 1999/00, 2000/01, 2001/02, 2002/03

# GÍ byggir nýtt lið upp

**Gøtumenn ætla í ár at spæla eitt nýtt lið saman, sum kann mynda felagið næstu árini. Fleiri av profilunum frá í fjør eru burtur, og tí fáa nýggir mans kjansin**

Eyðun Klakstein

Nú er gingin fleiri ár, síðani GÍ vann landskappingina í fótbólti, men gøtumenn hava øll árini síðani gulltíðina í 90'unum staðið seg væl.

Og hóast teir stundum hava verið undirmettir, hevur tað ikki nervað felagið, sum ár eftir ár hevur spælt seg til plaseringar so ovarliga, at tað hevur givið pláss í kappingum hjá UEFA.

Í ár stílar GÍ aftur eftir einum plássi millum fýra tey fremstu feløgini í landinum, men samstundis sum ávís ítróttarlig úrslit skulu røkkast, skal GÍ eisini spæla eitt nýtt lið saman, sum skal mynda felagið næstu árini.

Pólski venjarin hjá GÍ, Krzysztof Popczynski, er í vetur farin undir hesa uppgávu, og hann hevur kravt nógv av teimum spælarunum, sum ætla sær at vera við. Teir hava vant fleiri ferðir um vikuna, venjingin hevur verið hørð, og disiplinin skal vera í lagi.

– Hetta kappingárið skal brúkast til at leggja eitt gott grundalag fyri komandi árini hjá GÍ. Tað eru nógvir evnaríkir spælarar í felagnum, men trupulleikin í fyrstu syftu er, at vit hava ikki nóg nógvar royndar spælarar, og tað kann gerast ein vansi, sigur Krzystof.

## Færri royndir

Teir av stuðulsspælarunum hjá GÍ hava ikki verið við higartil í ár. Magni Jarnskor, sum hevur verið ímyndin av GÍ-andanum, hevur latið gaggurnar standa á hillini, og eisini tann nakað yngri Sámal Joensen hevur boðað frá, at hann ikki verður við. Harafturat er Súni Fríði Johannesen farin úr felagnum.

Hesir báðir hava verið sentralir spælarar á GÍ-liðnum í nógv ár, og tí verður saknur í royndunum, sum teir hava fingið gjøgnum heimligar og altjóða dystir.

Men umstøðurnar gera so, at aðrir spælarar fáa størri ábyrgd, og tað er á tann hátt, at teir skulu menna seg sum spælarar.

– Tú kanst siga, at fleiri av spælarunum á GÍ-liðnum hava lítlar og ongar royndir, men tað kemst so av, at aðrir spælarar hava verið á liðnum hini árini. Nú sleppa fleiri av hesum rættiliga at royna seg, og tað fer uttan iva at menna teir, sigur Krzysztof Popczynski.

Men tað eru framvegis spælarar á liðnum, sum hava vunnið sær royndir í nógvum heimligum og altjóða dystum. Spælarar sum Bartal Eliasen, Súni Olsen, Zdzislaw Janik, Leivur Hansen, Poul Ennigarð og Krzyztof Popczynski sjálvur koma at vera millum stuðulsspælararnar í ár, og tað eru góðir spælarar

## Neyvan gull

Kappingárárið í fjør var hampuligt. GÍ endaði á fjórða plássi í landskappingini, og hetta gav 11. atgongumerkið til europeiskan fótbólt.

Tað nervaði liðið nakað, at álopsparið Krzyztof Popczynski og Súni Fríði Johannesen vóru darvaðir av skaðum fittan part av árinum, men GÍ sigldi nøkunlunda millum skerini og kom upp á 32 stig fyri teir 18 dystirnar.

– Í ár koma vit neyvan at verða við í stríðnum um gullið, men málið er at gera tað so gott, sum vit kunnu við nýggja liðnum. Vit skulu royna at spæla góðan fótbólt, og so stíla vit eftir einum plássi millum fýra tey fremstu, sigur Krzyztof Popczynski.



*Hetta kappingarárið skal brúkast til at leggja eitt gott grundarlag fyri komandi árini hjá GÍ.*
Mynd: Álvur Haraldsen

## Leikarahópur

Tølini, sum eru viðmerkt, siga, hvussu nógvar dystir/mál leikarin spældi/gjørdi fyri felagið í 2002, og hvussu nógv (gul-reyð) kort leikarin hevur fingið í sama tíðarskeiði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Hallur Hansen | 16/-24 (0-0) | | |
| Jacek Przbylski (PÓL) | | | |
| Mortan Joensen | 2/-5 (0-0) | | |
| **Verja** | | | |
| Bartal Eliasen | 14/3 (6-0) | 4/0 | ÍF |
| Poul Ennigarð | 13/0 (2-0) | 1/0 | |
| Leivur Hansen | 18/0 (1-0) | | |
| Anton Skoradal | | | |
| Jónreid Dalheim | 5/0 (0-0) | | |
| Poul Andrias Jacobsen | | | |
| Kaj Ennigarð | 2/0 (0-0) | | |
| Poul Arni Jacobsen | | | |
| Bjarni Justinussen | | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Hans Pauli Petersen | 16/2 (4-0) | | |
| Zdzislaw Janik (PÓL) | 17/2 (4-0) | | |
| Bárður á Lakjuni | 7/0 (1-0) | | ÍF, KÍ |
| Súni Olsen | 14/5 (5-0) | 6/1 | |
| Símun Samuelsen | | | |
| Høgni Madsen | 1/0 (0-0) | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| Símun Louis Jacobsen | | | |
| Hanus Jacobsen | | | |
| Áslakur R. Petersen | 10/1 (4-0) | | ÍF |
| **Álop** | | | |
| Magnus Skoralíð | 12/0 (0-0) | | |
| Krysztof Popczynski (PÓL) | 12/2 (1-0) | | VB |
| Páll Rói Poulsen | 3/0 (0-0) | | |
| Per Jacobsen | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Jacek Przbylski (PÓL) | | Pólland | |
| Símun Samuelsen | 3/0 (0-0) | VB | |
| **Frágongd** | | | |
| Magni Jarnskor | 15/1 (6-1) | Givin | |
| Sámal Joensen | 15/9 (2-1) | Givin | |
| Henning Jarnskor | 3/0 (3-0) | Uttanlands | |
| Poul Henning Jacobsen | 1/0 (1-0) | Givin | |
| Súni Fríði Johannesen | 17/7 (0-0) | B68 | |
| Jóan Petur Olsen | 14/0 (0-0) | Givin | |
| **Venjari** | | | |
| Krysztof Popczynski (PÓL) | | | |



# Úr Krakow til Gøtu



*– Tað var eitt stórt skifti at koma til Føroya, og á onkran hátt vóru umstøðurnar verri enn í 5. deild í Póllandi, sigur Krzysztof og sipar til, at langt frá allir spælararnir, sum hann vandi, tóku fótbóltsspælið í nóg stórum álvara.*

Mynd: Eyðun Klakstein

**– Vit hava tað gott í Føroyum, men vit sakna veðrið í Póllandi, sigur Krzysztof Popczynski, sum saman við familju síni hevur búð í Føroyum í sløk fimm ár. Hann heldur, at hann hevur framvegis nógv at læra sum venjari**

Eyðun Klakstein

Tað er langur teinur úr pólska býnum Krakow til eina bygd í Eysturoynni.

Og teinurin gerst ikki styttri, tá ið fleiri millumlendingar skulu gerast kring Europa.

Hóast hetta hevur Krzysztof Popczynski funnið leiðina til Gøtu, og har skal hann vera spælandi venjari komandi árið.

– Eg havi havt møguleikan at sleppa til HB, B36 og KÍ, men GÍ er ein góð avbjóðing fyri meg í løtuni. Eg eti við eini lítlari skeið, og mær dámar at taka smá fet. Men fetini skulu vera frameftir, og her í Gøtu havi eg møguleika at menna meg sum venjari, samstundis sum avbjóðingin at byggja eitt nýtt lið upp er spennandi, sigur Krzysztof.

– Umstøðurnar í Gøtu eru góðar, og tað sær áhugavert út við liðnum. Spælararnir vilja nakað, og tað er kapping um plássini. Harafturat merki eg nógv størri áhuga frá fólkunum, sum sita í nevndini í felagnum, enn eg gjørdi í Vági móti endanum.

## Úr Póllandi til Svøríki

Krzysztof byrjaði sína yrkisleið sum fótbóltsspælari í grannalagnum hjá Krakow, har hann vaks upp. Hann spældi sum blaðungur í einum 5. deildarfelagi í Póllandi, áðrenn hann í 1987 fekk sín fyrsta sáttmála. Tað var við eitt 3. deildarfelag, og 18 ára gamli spælarin sá stóran møguleika í hesum.

Tvey ár seinni flutti hann aftur til Krakow at spæla, men hesaferð var tað við 2. deildarfelagnum í býnum, og teir fluttu upp í 1. deild. Krzysztof spældi í pólsku 1. deild fram til 1994, tá ið hann fór til Svøríkis at spæla.

Hann spældi í 1. deildarfelagnum Kiruna FF í eitt ár, áðrenn hann endaði aftur í Krakow.

## Millumlendi í Danmark

Síðani spældi Krzysztof í eitt ár í Grikkalandi, og fór síðani til Danmarkar at royna seg. Hann spældi í Esbjerg í tvey ár, og her kom hann av fyrstan tíð í samband við ein føroying. Fyrrverandi landsliðsspælarin Jan Allan Müller spældi eisini í Esbjerg um hetta mundið, og teir komu at kennast.

Hetta hevði við sær samband við til Vágs, har Krzysztof kom at spæla og vera venjari á summri í 1998.

– Sáttmálin í Esbjerg var úti, og teir vildu leingja sáttmálan við meg. Men eg hevði mist plássið á liðnum, og tí hevði eg hug at royna nakað nýtt. VB leitaði eftir einum spælandi venjara, og tað ljóðaði spennandi, greiðir hann frá.

## VB fekk gull

Umstøðurnar í Føroyum var nakrar heilt aðrar, enn hann var vanur við at spæla undir.

– Tað var eitt stórt skifti at koma til Føroya, og á onkran hátt vóru umstøðurnar verri enn í 5. deild í Póllandi, sigur Krzysztof og sipar til, at langt frá allir spælararnir, sum hann vandi, tóku fótbóltsspælið í nóg stórum álvara.

– Tað var sum at byrja av nýggjum í Vági. Nógvir spælarar spældu bara til stuttleika, og tú visti ongantíð, um tú hevði sjey ella fimtan spælarar til venjing. Men eg royndi at skapa meira professionellar umstøður, og eg haldi, at tað lønti seg, sigur hann og kann fegnast um, at hann førdi VB til fyrsta meistaraheitið í bestu mansdeildini. Tað var í 2000.

## Kroppurin ikki tann sami

Í fjør fór Krzysztof Popczynski til Gøtu at spæla, og her skuldi hann ikki hugsa um venjarayrki, tí Jóhan Nielsen var venjari. Men kappingarárið í fjør gjørdist ikki til tað stóra, tí hann var plágaður av skaðum.

– Eg fekk ein skaða tíðliga á árinum, og tað órógvaði mær stóran part av kappingini. Eg elski at spæla fótbólt, men nú er tað trupult at spæla, tí kroppurin er ikki so væl fyri, sum hann plagdi at vera. Eg gevi tí harða vøllinum í Vági ein part av skuldini fyri tað, tí hann fer illa við knøunum. Tú merkir tað ikki beinanvegin, men tað kemur aftur um brekku seinni, heldur Krzysztof.

Hóast hann nú er vorðin venjari í GÍ, ætlar hann sær eisini á vøllin at spæla.

## Hava tað gott í Føroyum

Krzysztof Popczynski hevur nú búð í Føroyum í sløk fimm ár, og hann ætlar sær at verða verandi her í nøkur ár afturat, um tað letur seg gera.

– Tað er stórur munur á Póllandi og Føroyum, og fyri okkum er og verður Póllandi heimlandið. Har hava vit familju og vinir, so vit leingjast eitt sindur heim. Men hinvegin vil eg gjarna, at familjan fær meira støðug viðurskifti, tí vit hava ferðast sera nógv, sigur hann.

Eldra dóttir hansara hevur gingið í skúla í Føroyum hesi fimm árini, og tí verður tað trupult at flyta heima til Póllands ella annað land at búgva nú. Yngra dóttirin skal í skúla nú, so Krzysztof Popczynski roknar við, at tey steðga í Føroyum í nøkur ár afturat.

– Vit hava tað gott her. Vit hava hús og arbeiðið, men vit sakna veðrið í Póllandi, sigur hann.